# Nøvn

Magnus Gunnarsson
maggi@sosialurin.fo



## Tøkk

Hjartaliga takki eg øllum, sum gleddu meg í samband við, tá eg fylti 90 ár 22. juli.

*Heilsan*
**Elisabeth Olsen**

## Føðing



17. august fingu Lena Hermansson og Erik Klint ein son á sjúkrahúsinum í Linköping, Svøríki/ Sverige. Navnið hans verður Sebastian. Hann var 52 cm langur og vigaði 3380 gr.

## Merkisdagar



**Prógv**
Í januar mánað 2010 hevur Óluva Mcleod Venned lokið prógv við heitinum "Professionsbachelor som pædagog" á pedagog-semi-nariunum í Ballerup. Í august mánað 2010 hevur Ulrík í Hjøllum lokið prógv sum løgfrøðingur (cand.jur.) á universitetinum í Keypmannahavn.



**Prógv**
Ingun Nolsøe Olsen úr Leirvík hevur 17. juli lokið prógv sum Bachelor í Business Economics and Tourism frá Manchester Metropolitan University.

**Prógv**
20. august hevur Gunnvør Joensen, Klaksvík, lokið prógv við University of Aberdeen, Scotland sum Master of Science in Biotechnology with Biobusiness.

**Prógv**
23. august hevur Magnus Norðberg, Tórshavn, lokið prógv við University of Aberdeen, Scotland sum Master of Science in Human Nutrition and Metabolism.

**Prógv**
Jens Kristjan Norðberg, Tórshavn, hevur 24. august við University of Aberdeen tikin prógv sum Master of Science in Integrated Petroleum Geoscience.

**Prógv**
31. august bleiv Arnhold Olavsson Jensen, Tvøroyri, liðugur sum serlækni innan almen medicin.

**60 ára føðingardagur**
Leygardagin 18. september verður Rúna Berghamar 60 ár. Opið hús verður í Pálsstovu kl. 12-17.

# Jógvan Isaksen 60 ár



Mikudagin 25. august fylti føroyski kriminalrithøvundurin, búsitandi í Danmark, Jógvan Isaksen, 60 ár.

Jógvan er føddur í 1950 í Havn. Hann tók studentsprógv á Føroya Studentaskúla í 1970.

Hann hevur lisið á universitetinum í Århus og Keypmannahavn og gjørdist í 1982 magistari í norður-lendskum bókmentum. Síðani 1986 hevur hann verið lærari við Keypmannahavnar Universitet.

Jógvan hevur m.a.havt mentunarligar sendingar í Útvarpi Føroya, Sjónvarpi Føroya og Danmarks Radio. Hann hevur eisini undirvíst fleiri skeið á Fróðskaparsetrinum.

Jógvan hevur umframt bókmentasøgu, bókmenta-greinir og ummæli skrivað fleiri krimiskaldsøgur og barnakrimisøgur. Í 1994 fekk hann virðisløn M.A.Jacobsens fyri yrkisbókmentir.

# Tabu um prostatakrabba kámast

Nú tora menn betur enn nakrantíð at gloppa duldargluggan fyri tí tabu, ið hevur valdað higartil í sambandi við umrøðuna, ella rættari, ta tvørrandi umrøðuna av prostatakrabba.

- Tað varð prógvað mikukvøldið 1. september 2010, tá ið minst 230 mans – bara menn – fylktust á Hotel Føroyum á fundi, skrivar Krabbameinsfelagið á heimasíðuni www.krabbamein.fo.

Krabbameinsfelagið skipaði fyri kunnandi tiltaki um prostatakrabba, og sjálvhjálparbólkur varð stovnaður.

- Prostatakrabbi er vorðin van-ligasta krabbasjúka í Føroyum, segði Johan Poulsen, yvirlækni, urologur, í framløgu um krabbamein í bløðru-hálskertlinum. Johan Poulsen tosaði um sjúkueyðkenni, um viðgerð nú samanborið við fyrr og um eftir-viðgerð og kontroll, og hann hevði eina stimbrandi frágreiðing um møguleikarnar fyri at fyribyrgja prostatakrabba.

Tummas í Garði, læknastjóri, narkosulækni, røddi um tilboðini á Landssjúkrahúsinum um at viðgera prostatakrabba og um ætlaninar hjá føroyska heilsuverkinum í framtíðini at viðgera sjúkuna.

Egi Dam, sjónleikari, ið hevur havt prostatakrabba, men sum er vorðin frískur, segði lívsjáttandi og bjartskygdur frá síni sjúkutilgongd. Á hesum væl mannaða fundi á Hotel Føroyum mikukvøldið 1. september var líkt til, at Egi mundi kveikja vón og áræði hjá monnum, ið hava og høvdu prostatakrabba.

Hetta kvøldið varð bólkur stovn-aður fyri menn, ið hava ella hava havt prostatakrabba. Eirikur Ólason Simonsen, ið varð sjúkur av krabba í bløðruhálskertlinum fyri nøkrum árum síðan, hevur játtað at hjálpa Krabbameinsfelagnum at skipa fyri tí nýstovnaða sjálvhjálparbólkinum.

Krabbameinsfelagið veit av royndum, at mannfólk eru minni fús enn konufólk at taka av teimum tilboðum, sum felagið hevur um kunn-ing, hjálp og leiðbeining í sambandi við krabbamein. Tí skipaði felagið fyri tiltakinum á Hotel Føroyum.

- Eitt serligt átak fyri menn, ið toktust at vera sera væl nøgdir, skrivar Krabbameinsfelagið.

# Føroyskt mentanartiltak í Berlin

Uttanríkisráðið skipar fyri einum tónleika- og mentanartiltaki í Berlin í døgunum 8-10. september. Berlin er vertur fyri stóru altjóða tónleikamessuni Popkomm um sama mundið, og føroyska tiltakið verður framt í samstarvi við Popkomm.

Áhugin í útheiminum fyri føroy-skum tónleiki og sniðgeving - og Føroyum sum heild - hevur verið vaks-andi seinastu árini. Í hesum sambandi eru Berlin, og Týskland annars, áhugaverdir marknaðir. Umframt at vera ein av høvuðsmarknaðunum hjá føroysku ferðavinnuni, verður Týskland mett at vera ein áhugaverdur marknaður, tá tað snýr seg um tónleikaútflutning og útflutning av øðrum skapandi vinnum. Føroyar hava tann fyrimun, at norðurlendska og skandinaviska brandið er sterkt, og norðurlendskar vørur - í breiðum týdningi - verða mettar at vera áhuga-verdar í Berlin í løtuni. Tí ræður um at smíða, meðan jarnið er heitt.

Endamálið við tiltakinum er at varpa ljós á, at Føroyar eru til, og somuleiðis at fremja útflutning av tónleiki og øðrum kreativum vinnum. Hetta verður gjørt við at skipa fyri einum forvitnisligum tiltaki í PercussionArtCenter, sum liggur nærhendis messuna. Staðið verður gjørt um til eina føroyska oyggj, har fólk kunnu koma inn á gólvið at njóta tónleik, myndlist, filmslist, sniðgeving og føroyskar bókmentir, sum eru týddar til týskt. Tey vitjandi fáa eisini høvið at smakka føroyskan mat og drekka. Harumframt verður eisini kunnað um møguleikarnar hjá ferðafólki at vitja Føroyar.

Budam og The Ghost fara at spæla dagliga fyri gestunum. Barbara í Gongini og Guðrun & Guðrun sýna teirra snið fram. Katrin Ottarsdóttir, Heiðrik av Heygum, Barbara í Gongini, Marianna Mørkøre og Rannvá Káradóttir sýna filmslist, meðan Edward Fuglø og Hansina Iversen sýna fram myndlist.

Tiltakið byrjar mikukvøldið við eini móttøku fyri innbodnum fjølmiðlum og umboðum fyri tónleika- og skapandi vinnu, har eisini umboð fyri føroyska tónleikavinnu luttaka, m.a. umboð fyri Tutl, og Norðurlandahúsið, sum er samstarvspartur í verkætlanini.

Tiltakið er fyriskipað í tøttum samstarvi við umboði fyri Spot Festivalin.